# Tað fer onki yvirskot av landinum enn á sinni

**– Vit eiga heldur at syrgja fyri at fáa, sum mest burturúr teimum íløgum, sum verða gjørdar í Føroyum, sigur av landsins størstu alarum**

ALING
*Áki Bertholdsen*

– Tað er skeivt at seta avmarkingar í verk fyri, hvussu vit skulu arbeiða í alivinnuni í Føroyum.

Tað heldur Frímund Hansen, sum er ein av oddamonnunum í einum av risanum í føroysku alivinnuni, Vestsalmon.

Hann sigur, at hann er ikki samdur í, at tað er rætt at seta lógir í gildið, sum avmarka møguleikarnar hjá teimum, sum eru í alivinnuni, at arbeiða frítt.

Hann sipar til regluna um, at útlendingar mugu ikki eiga meiri enn 33% av einum føroyskum alivirki. Og hann sipar til ætlaðu regluna um, at onki einstakt felag má eiga meiri enn 10-20% av samlaðu alivinnuni.

– Vit eiga ikki at seta slíkar avmarkingar í gildið, tí tær tæna ongum endamáli, sigur hann.

– Vit eiga heldur at fáa sum mest burturúr teimum íløgum, sum verða gjørdar í Føroyum

– Vansarnir við at seta slíkar reglar í gildið eru nógv størri enn fyrimunirnir, sigur Frímund Hansen.

Við hesum váttar hann sostatt, at tað eru fyrimunir við at áseta slíkar reglar.

– Fyrimunurin kann vera, at fáa útlendingar so stórt vald, so at teir kunnu stýra av føroysku alingina uttanlands, kunnu teir minka um alingina í Føroyum, um teir síggja sær onkran fyrimun burturúr tí, eitt nú fyri at fremja virksemið í øðrum alivirkjum, sum teir hava aðrastaðni.

Hinvegin heldur hann, at tað kunnu vera fleiri fyrimunir við at fáa útlendingar upp í alivinnuna.

Hann vísir m.a. á, at tann, sum setir pening í alivinnuna, setir ógvuliga nógvan pening í vága, tí alivinnnan bindur nógvan pening.



*– Tað er skeivt at seta mark fyri, hvussu nógv útlendingar kunnu eiga av føroyskari aling, sigur ein av allarstørstu alarum í Føroyum*

– Og eru útlendingar uppi í, taka teir eisini sín part av váganum og sostatt eru tað fleiri um at bera vágan.

Hann heldur ikki, at nakað hald er í óttanum um, at útlendsk luttøka í føroysku alivinnuni eisini førir við sær, at yvirskotið fer av landinum.

–Tað fara at ganga nógv Harrans ár, áðrenn nakað yvirskot fer av landinum, tí tað hevur ongin ráð til, sum er. Alt yvirskotið, sum tað er,verður tvørturímóti brúkt til íløgur fyri at menna alingina enn meiri, tvs, til íløgur í útgerð og í fisk o.a. So eg kenni onki til, at nakað yvirskot fer av landinum. Og skuldi nakað yvirskot verið at sent av landinum, verður tað væl og virðiliga skattað í Føroyum, áðrenn tað fer nakran veg.

### Kunnu læra

Frímund Hansen vísir eisini á, at hóast føroyingar eru blivnir dugnaligir at ala, er tað framvegis ein hópur, sum vit vit útlendignar kunnu læra okkum á ymsum økjum.

– Føroyingar duga væl at fáa framleiðslukostnaðin niður á sjálvum alivirkjunum. Men, hvat marknaðinum viðvíkur, kunnu útlendingar læra okkum ein hóp. Eitt nú kunnu teir læra okkum ein hóp um at finna nýggjar marknaðir.

– Somuleiðis kunnu teir læra okkum ein hóp um, hvussu vit fáa fatur á sum mest av tí peningi, sum liggur ímillum sjálvan framleiðslukostnaðin og tað, sum laksurin kostar í kølidiskunum í handlunum runt um. – Har er ein stórur munur í peningi og tað, sum vit mugu miðja eftir, er, at fáa sum mest av tí prísmuninum at verða verandi í Føroyum, sigur Frímund Hansen.

# Hyggja at alimøguleikum í Íslandi

**Føroyska alivirkið, Vestsalmon, kannar nú møguleikarnar fyri at fara undir aling í Íslandi. Kemur tað so langt, fara vit at byrja varisliga, sigur Frímund Hansen**

VINNULÍV
*Áki Bertholdsen*

Tað eru ikki bara útlendingar, sum eru áhugaðir í at sleppa uppí alivinnuna í Føroyum. Tað gongur eisini hinvegin, tí nú eru føroyingar eisini blivnir áhugaðir fyri at fara undir aling uttanlands.

Tað er ein av allarstørstu alivirkjunum í Føroyum, Vestsalmon, sum nú er farið at kanna møguleikarnar at fara undir aling uttanlands.

Vestsalmon hevur fyribils vent eyguni ímóti Íslandi og er farið at kanna møguleikarnar fyri at sleppa upp í alivinnuna í grannalandinum fyri vestan.

Frímund Hansen á Vestsalmon váttar, at teir eru farnir at hyggja út um landoddarnar og at Ísland er tað landið, sum teir í fyrstu syftu hugsa um.

Men hann leggur dent á, at fyribils er alt á kanningarstøði og at enn er onki avgjørt.

Hann sigur, at umboð fyri Vestsalmon hava verið eina kanningarferð í Íslandi, har teir hava hugt at umstøðunum.

Fyribils er tað Seyðisfjørður, sum teir eru mest áhugaðir í.

– Har er ferðasambandi í lagi við tað, at Norrøna siglur hagar, so tað er nærliggjandi at kanna møguleikarnar har fyrst. Men sjálvandi eru eisini aðrir møguleikar, sigur Frímund Hansen.

Men hann sigur, at enn er langt eftir á mál, áðrenn nøkur aling verður tikin upp, um tað yvirhøvur kemur so langt.

– Tað eru nógvir spurningar eftir at loysa. Vit kenna ikki íslendska lógarverkið á økinum. Eitt nú vita vit ikki, um teir hava avmarkingar fyri útlendskari luttøku í alivinnuni, eins og føroyingar hava, ella ikki. Og eru slíkar reglur, vita vit ikki, hvussu strangar tær eru. Vit vita heldur ikki, hvussu umstøðurnar eru við algum, ella við rekandi ísi, o.s.fr.

– Vit vita heldur ikki, hvussu er vorðið við smolti.

Hann sigur, at kemur tað so langt, skuldu teir helst kunna fingið smolt úr Íslandi fyri at sleppa undan vandanum fyri at draga óynsktar sjúkur til Íslands við smoltum uttaneftir.

– Men vit vita heldur ikki, um tað yvirhøvur ber til at fáa smolt úr Íslandi.

Hann vísir eisini á, umstøðurnar at ala eru øðrvísi í Íslandi enn tær eru í Føroyum. Eitt nú er sjógvurin kaldari. Alingin, sum hevur verið har yviri, hevur ikki gingið so vælø So alt í alt eru tað nógvir spurningar at kanna til botns, áðrenn nøkur aling kemur uppá tal.

Annars heldur hann, at onnur viðurskifti eru í lagi á Seyðisfjørðinum, eitt nú landslag, dýpdir, ferðasamband o.s.fr.



*Føroyska alivirki, Vestsalmon, hugsar nú um at sleppa upp í aling uttanlands. Fyribils hava teir sett kikaran á Ísland, har teir hava hugt eftir umstøðunum á Seyðisfirði*

### Byrja varisliga

Norska blaðið Fiskaren endurgav nú um dagarnar íslendskt sjónvarp fyri at siga, at ætlanin var var gera eina alistøð í Seyðisfirði, har tað skulu alast ímillum 4.000 og 8.000 tons av laksi um árið.

– Tað er onki hald í tí hesum tíðindunum. Kemur tað so langt, at vit taka aling upp í Íslandi, verður tað byrjað við størsta varsemi, sigur Frímund Hansen.

Hóast hann er varin, dylir hann ikki fyri, at hetta kundi verið ein møguleiki at ment og styrkt Vestsalmon og at givið virkinum eitt bein afturat at staði á.

– Tað skerst ikki burtur, at møguleikarnir í Føroyum eru avmarkaðir. Fyri tað fyrsta er landið so lítið, at tað er mark fyri, hvussu nógvari aling tað er pláss fyri. Samstundis hevur løgtingið avmarkað møguleikarnar hjá alivirkjum at menna seg. Hann hugsar m.a. um regluna um, at útlendingar kunnu ikki eiga meiri enn 33% av einum føroyskum alivirki. Hann hugsar eisini um regluna um regluna, sum ætlanin er at seta í verk, um, at onki einstakt virki kann ikki eiga meiri enn 20% av samlaðu alingini í Føroyum.



# Økið í Sandvíkum friðað

**Náttúrufriðingarnevndin hevur tikið avgerð um, at økið inni í Sandvíkum skal friðast. Hetta varð gjørt eftir at feløg og privatpersónar høvdu sent nevndini umsókn um at friða økið. Tórshavnar býráð hevði annars samtykt at lata ítróttinum økið, men hetta verður væntandi av ongum**

FRIÐING
*Stefan í Skorini*

Mikið kjak hevur verið um hetta økið inni í Sandvíkum. Býráðið hevur havt ætlanir um at nýta økið til ítróttarvirksemi, meðan onnur fólk hava heitt á Náttúrufriðingarnevndina um at friða økið.

Nevndin hevur nú tikið støðu. Hon mælir til, at hesin vakri blettur skal friðast. Fólk kunnu tó skjóta avgerðina hjá Náttúrufriðingarnevndini inn fyri Yvirfriðingarnevndina innan fýra vikur. Væntandi er tó, at Yvirfriðingarnevndin fer at taka somu støðu og friða økið, men hetta er tó ikki heilt greitt enn.

### Ber av í vakurleika

Nevndin hevur fleiri grundgevingar fyri, at økið verður friðað.

Hon sigur í grundgevingini:

»Nevnda økið ber av í vakurleika, liggur væl fyri og hevur sereyðkennir í landslagnum, plantugróðri og djóralívi, líkasum nevndin eisini er av tí áskoðan, at økið hevur stóran týdning fyri fólk og fæ. Eisini metir nevndin, at tað, ið laðað er, hevur stóran týdning«

Úrskurðurin hjá Náttúrufriðingarnevndini er, at økið í Sandvíkum – frá Sandvíkarryssu og inn á Kallanes, frá sjóvarmálanum og niðan til landsvegin – verður at friða.

Nevndin hevur fingið umsóknina frá Hanusi Vang, fyrrverandi bónda í Hoyvík, Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelagi og øðrum áhugaðum.

Hesi vóru fyri jól á fundi við Náttúrufriðingarnevndini, har tey vístu á, hví tey meta, at hetta økið skal friðast.

Á seinasta býráðsfundi hjá fráfarna býráði, ið var fyri jól, samtykti tað at lata 800.000 krónur til at keypa hetta økið frá Jarðarráðnum. Uppskotið var samtykt við tólv atkvøðum fyri og einari ímóti. Bara Páll Petersen atkvøddi ímóti.

Býráðið hevði ætlanir um at nýta hetta økið til ítrótt, og ætlanin var, at felagið Byrsumúli skuldi fáa økið at skjóta á.

### Gamalt mál

Hetta málið hevur verið til viðgerðar í ymsum stovnum í fleiri ár. Í 1996 samtykti býráðið av broyta býarskipanina, og tað hevði við sær, at økið í Sandvíkum skuldi nýtast til skjóting. Landsstýrið staðfesti í 1998 hesa avgerðina hjá býráðnum.

Í 1997 varð umsókn fyrstu ferð send friðingarnevndini um at friða økið, og nú hevur henda nevnd tikið ta avgerð, at økið skal friðast.



*Býráðið hevði játtað 800.000 krónur til at keypa hetta økið frá Jarðarráðnum, men nú hevur Náttúrufriðingarnevndin gjørt av, at hetta økið skal hava frið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Flotin liggur

**Vegna illveðrið seinastu dagarnar hevur størsti parturin av føroyska flotanum ligið við bryggju. Hetta ávirkar ikki prísin munandi, men trýstir hann nakað niður, tí allir hava verið inni og landa í senn, heldur reiðari**

FISKIVINNA
*Stefan í Skorini*

Illveður hevur verið um havið um Føroyar seinastu dagarnar, og hetta hevur forðað fleiri fiskiførum í at fara til fiskiskap. Tey liggja ístaðin bundin við bryggju, og manningin kann taka sær av løttum. Veðrið hevur eisini verið so ringt, at Norrøna avlýsti túrin til Hanstholm mánadagin, tí tað hevði ikki borið til at komið aftur til ásettu tíðina.

Eingir av partrolarunum hava verið til fiskiskap seinastu dagarnar, og smábátarnir liggja eisini allir sum ein. Sama skilið er hjá djúpvatnstrolarunum, sum ikki fiska nakað hesar dagarnar. Teir flestu línubátarnir landaðu beint áðrenn illveðrið og fóru ikki útaftur beinanvegin. Um nakar er úti, so liggja teir óivað bakk.

Reiðararar, halda tó ikki, at hetta hevur ávirkað prísirnar í so stóran mun, sum man kanska kundi vænta, men tó sæst tað aftur á prísinum.

Av tí at nógvir bátar vóru inni og landaðu í senn, trýsti tað tó prísin nakað niður, tí útboðið vaks.

Upsa- og toskaprísurin er fallin nakað seinastu tíðina, men tað er tó ikki orsakað av illveðrinum.

Annars er at frætta, at prísurin sum heild hevur verið ómetaliga góður seinasta hálva árið, og beint fyri jól var hann náddur so langt upp, at hann sjáldan hevur verið hægri. Nú er prísurin tó dalaður nakað aftur.

Tað er væntandi, at flestu bátarnir leggja frá landi aftur í dag, hósdagin. Veðurfrøðingarnir siga, at fríggjadagin verður veður aftur at fiska, tí tá makar hann vindin munandi. Bátarnir fara út nakað áðrenn, so teir eru tilreiðar, tá líkindini batna.

